


# HANUS TULKAR
# HANS JACOB GLERFOSS

Í SAMBANDI VIÐ **60** ÁRA FØÐINGARDAGIN HJÁ **HANUSI G. JOHANSEN** VERÐUR **Í DAG** GIVIN ÚT **FLØGA** VIÐ FIMM AV **HANSARA** LØGUM TIL **YRKINGAR** HJÁ HANS JACOBI GLERFOSS. **»EITT BLAÐ EG Á KANN SKRIVA«** KALLAST FLØGAN, SUM JENS L. THOMSEN HEVUR FRAMLEITT

**Uni Arge**

Tær fimm yrkingarnar hjá Hans Jacobi Glerfoss eru um náttúru og at skriva, og Hanus gjørdi løgini millum 1979 og 1990. Í fløguhúsanum skrivar dóttir yrkjaran, Hansa Marfríða Glerfoss, um pápa sín, ið doyði 17. januar í ár, at hann var ein droymari, ein romantikari og ein leitari.

»Lív hansara var mangan ein reikan í einsemi og í toku. Til tíðir ein oyðimarkargongd, leitandi í tosta eftir lívi og vætu, við einum anda bønandi um frið. Einari leitan bornari av longsli eftir onkrum, ið hann trúði var betri. Ein leitan, stundum í blindum, men altíð vendum móti ljósinum og hitanum og lívinum. Tó hendan lýsing kann tykjast heldur døpur, ja, beinleiðis melankolsk, bera yrkingar hansara eyðkenni av ugga og vón.«

Hon fegnast um tulkingarnar hjá Hanusi G. Johansen av teimum fimm yrkingunum og heldur, at tær eru meistarligar.

»Hann hevur blást lívsanda í og




harvið givið orðunum veingir við at smíða løg og leggja rødd til, soleiðis at hesar burturgoymdu yrkingar annars fáa endurreisn í nýggjum hami," skrivar Hansa Marfríða Glerfoss.

Tónleikarar á fløguni eru Hanus G. Johansen, Angelika Nielsen og Jens L. Thomsen, sum eisini hevur tikið upp og ljóðblandað tónleikin. Blýantstekningar og vatnlistmyndina í fløguhúsanum gjørdi Hans Jacob Glerfoss.

Um Hans Jacob Glerfoss verður upplýst í húsanum, at hann vaks upp í Kunoy hjá ommu og abba sínum, og sum 25 ára gamal gjørdi hann av at liva sum listamaður burturav. Hann gav út trý yrkingasøvn, »Til B« í 1966, »Fjallafossar« í 1967 og »Kvirra í reyðum og bláum« í 1969. Fyri hesi yrkingasøvnini fekk hann í 1969 mentanarvirðisløn M.A. Jacobsens fyri fagrar bókmentir.

»Eitt blað eg á kann skriva« verður løgd fram í Norðurlandahúsinum í dag millum kl. 16.00 og 18.00 í sambandi við, at føðingardagur verður hildin fyri Hanusi G. Johansen. Røður verða hildnar, og Hanus sjálvur fer at spæla.